# – Einki grundarlag til at kritisera avgerðina

**Karen Marie Olesen fúti metir ikki at grundarlag er fyri at kritisera, avgerðina hjá vakthavandi á Løgreglustøðini um ikki sendi boð eftir kavarum frá sløkkiliðnum nýggjársnátt.**

TÍÐINDAFUNDUR

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Løgreglan hevði í dag boðið til tíðindafund, Fútin vísti á, at tá man metur um tílík mál, er týdningarmikið at spola aftur, og royna at seta seg í støðuna hjá vakthavandi, og ikki hava tað innlitið, og vitanina, ið vit hava fingið síðan við í metanina.

Hon viðgongur, at afturlítandi er sjálvandi ynskiligt at kavarar vóru sendir á staðið beinanvegin, men við tí vitan, ið vakthavandi hevði í løtuni, tá avgerðin varð tikin er eingin orsøk til at kritisera avgerðina.

Tó fer løgreglan at eftirmeta hendingina saman við havnarmyndugleikunum og sløkkiliðnum. Í samrøðuni sum vit prenta her á síðuni, sæst at talan ikki er um beinleiðis áheitan til løgregluna um, at senda boð eftir kavara.

Uni Vestureið politiinspektørur vísir á. At løgreglan ikki visti av, at sløkkiliðið hevði møguleika at kava í myrkrið, og hetta var orsøkin til, at løgreglan ikki sendi boð eftir sløkkiliðnum fyrr enn tað lýsti. Hesa vitan hevur løgreglan nú, og hon er send út til øll vakthavandi hjá løgregluni.



*Uni Vestureið, politiinspektørur, og Karen Marie Olesen, fúti*

## Talan var ongantíð um bjarging

Vakthavandi á Havnarskrivstovuni í Havn hevði verið rættiliga leingi á økinum, tá fráboðanin um líkið kom frá manningini á Lómi. Hann hevði verið á økinum og gjørt klárt til at skipið kom, og hevði millum annað tikið eina pressending upp úr sjónum. Tí eri eingin orsøk til at vænta at her var talan um annað enn bjarging av einum líki.

Maðurin í druknaði varð síðst sæddur í Steinatúni 2 tímar, áðrenn líkið var sætt í skrúvuvatninum hjá Lómi. Men hann var ikki dottin á sjógv meðan vakthavandi á havnarskrivstovuni var á økinum, so hann var ivaleyst longu deyður.

**nud**

# Samrøða millum politiið og Havnarskrivstovuna

*Niels Uni Dam & Rólant Waag Dam*

**Nógv hevur verið tosað um leiklutin hjá løgregluni í málinum um druknaða mannin, sum varð funnin á Havnarvág nýggjársdag. Í dag hevði løgreglan tikið tað óvanliga stig, at teir spældu samrøðuna millum vakthavandi og fráboðaran av, á tíðindafundi fyrra partin í dag.**
**Vit hava fingið eitt avrit av telefonsamrøðuni, og prenta tað niðanfyri.**

Avskrivt av telefonsamrøðu

Tvær ringingar til 351448 tann 1. januar 07 á politistøðina í Tórshavn. Vakthavandi er (navn ikki upplýst), í samrøðuni niðanfyri nevndur sum: P. Tann, ið ringir er: (navn er upplýst), Havnarskrivstovan. Í samrøðuni nevndur sum: H

Samrøða 1 kl 00:40

P: Politistøðin í Havn.
H: ja, gott kvøld, Tórshavnar Havn
P: Ja gott kvøld Tórshavnar Havn
H: gott nýggjár.
P: ja takk, somuleiðis.
H: tú eg havi eini ... keðiligan fyrispurning altso
P: Nå
H: Vita tit, um tað saknast nakað fólk?
P: tað kenna ogur einki til, nei.
H: einki til, nei,... nei so mugu vit fáa kannað tað, kanska fáa Brandstøðina ísoí... Blikur akkurát komin, .. hann kom at her
P: Ja
H: Eg var so aftur tók ímóti endanum tá kom upp, og so rópar maðurin til mín ehhh. ... kom, kom líka aftur her og hygg, tá sigur hann, tað sá út sum ein ... ein kroppur kom upp við skrúvuvatninu har, fór líkasum inn ímóti ha?
P: OK
H: Vit hava so hugt har, tað flýtur so ikki nakað
P: OK
H: Tað var tí, at teir spurdur beinanvegin, um tað var nakar saknaður, ella nakað sovorðið ... og teir ganga framvið og lýsa eisini niðurvið her, men ljósið er kanska ikki so kraftugt akkurát, ... so,
P: Bíða, bíða mær eitt lítið sindur, (hoyrist sera lágmælt)
H: so eg ætlaði at fara og fáa eina... eina góða lykt at lýsa við eitt sindur, hvat man sær,.... ella um man skuldi fingið teir at hugt...
P: bíða eitt lítið sindur, eg skal líka fra at vita.
H: Ja....

Friður á samørðuni í 22 sek so

P: bíða mær eitt sindur....

Friður á samrøðuni í 17 sek. so

P. einasta sum... sum er her, sum kundi verið nakað um hatta, har ein í Klaksvík,... men...
H: ja,
P: men hann hevur í hvussu so er verið.... tað er morgun,... ella hvussu so er eitt ella annað um tað,... og seinnapartin eisini, tá hevur hann so ikki verið í Havn.... tað hevur verið í Klaksvík
H: ja,
P: so nei, ikki... ikki hetta her døgnið í hvussu so er....
H: nei
P: ikki sum me... eg komi at hugsa um...
H: nei,
P: nakað skal, ... nakar skal vera....
P: Hvussu eitur tú?
H: Tað er (navn upplýst), vakt,....
P: (endurtøka av fornavni)
H: Tað eru teir á Lómi, sum boðaðu frá... teir løgdu merki til hetta kom líka sum upp við skrúvuvatninum og fór inn undir her... plattin her.
P: OK, ja
H: og tað er ... vis tað er, so er tað sikkurt okkurt sum hevur... ligið niðri veitst tú.... tað er so grunt ha...
P: Nettup, ja...
H: at skrúvuvatnið hevur tikið tað upp, veitst tú, ... og kanska farið niður við aftur..
P: jamen vissi eg,... eg skal hyggja ígjøgnum døgnrapportirnar.
H: Ja,
P: ...nakrar dagar frameftir, ella aftureftir eitur tað.
H: Ja
P: fínasta slag... eh... (navn á fráboðaranevnt)
H. Ja, fínt
P: ok, bei...

Samlaða longd á upptøkuni er 2 minturrir og 53 sekund

Samrøða kl 06:45 sama morgun.

P: Politistøðin í Havn.
H: ja, góðan morgun aftur, og gott nýggjár, eg veit ikki, um tað er sami maðurin og tosaði við
P: Nei tað er tað ikki.
H: nei,... tað er (navn upplýst), Havnarskrivstovan.
P: oh, ja...
H: tú, tað var viðvíkjandi hasum har, sum teir observeraðu á ... á... Lómi.
P: ja, tað minnist eg,... handan í nátt.
H: handan mannin har...., vit hava havt ljós frá her og tjekkað av, men vit hava so ikki sæð nakað, so hetta er nokk sokkið aftur.
P: ja, .... og hvat fekk tú fatur á nøkrum har uppi? komu kavarar oman?
H: nei,
P: nei,
H: eg veit ikki, um ikki skulu fáa teir oman í morgun at tjekka tað av? senda tit boð eftir teimu, ella skulu vit boða teimum tað frá?
P: Tú, tað er tað, at vit eru heimagangandi, og eg havi... tann vakthavandi sum... sum skal møta nú, hon er ikki møtt enn,... øh.. vit kunnu kunna hana um tað, so eg veit ikki... hvussu leinki ertt ú á vakt?
H: nei, eg fari heim eisini nú
P: tú fer eisini heim nú
H: ja, eg kunni so hendan her um tað, eg havi skrivað
P: ja, tú kundi so kunnað hann um tað, og so kunnu tey kanska snakka saman í loypi av degnum
H: ja veitst tú e... siga, man hevur ikki viljað sett nakað í gongd í... í hesum myrkrinum tað hevur verið,... hvis tað hevur flotið nakað, ... flotnað uppaftur, so... so ... tí vit hava havt gott ljós at lýst við veitst tú, og hugt framvið skipinum eisini, um ... tí tað er inni í krókinum altso.
P: men er man altso sikkur uppá, at tað var ein kroppur ella...
H: ja, ja altso hann... hann.. segði tað var í ljósum cowboybyksum og einum myrkum... sovorðnum jakka ella drakt... altso.... anorakk ella sovorðnum, soleiðis beskrivaði hann tað, og hann hevur verið vakt líka til kl 4 í nátt, tá hesin stýrimaðurin - tann maðurin sum, ella teir báðir, sum vóru har aftur sóu tað, tað var í tí, tá hann kom inn ímóti har? og fær fast...tú veit, eg stóð inni á kaiini... eg fór so út at hyggja, tá er tað nokk farið innundir, tí eg sá tað ongantíð, sjálvur, men hann sigur í einum ljósum cowboybuksum og... og... einari myrkari, myrk í erva – eg veit ikki, anorakk ella sovorðið, altso ... soleiðis tók hann til.
P: ok
H: ja, so tað ivaðist hann ikki í, og hann.... hann... var her alla tíðina og bleiv við at... at...
P: hvør var tað, sigur tú?
H: tað hevur nokk verið 2. stýrimaðurin á Lómi, ... veitst tú, teir standa so høgt, tá teir eru har aftur...
P: tað er Lómur?
H: Lómur, ja
P: OK, ja, eg tr´juði tað var Blikur.
H: ja, nei, Lómur...
P: tú,... ja.... ja, nær.. eg má altso kunna, kunna vakthavandi sum møtir, so.. og so mugu tey bara snakkast við í loypi av degnum, hon kemur nú inn í garðin síggi eg...
H: og hatta har e... nei, ... tað er tað, at Norrøna,... her verður so eingin trafikkur fyrr enn kl 9 haldi eg, 9 nei bíða nú, tað er kl 8, hon kemur í morgun... eh ... Smyril haldi eg, nei, bíða nú, tað er kl 8, hon kemur í morgun... eh... Smyril haldi eg, nei, bíða nú tvass, tað er... hann siglir sum sunnudag ja, so hann verður her útímóti 9, og so er Norrøna kl 11, um 11-tíðina, um tað kann so órógva nakað?
P: eg síggi ikki fráboðan um nakran, sum skuldi verið saknaður, altso tað havi eg gott nokk ikki fingið , men hvis hann er so sikkur upp á tað, so...
H: ja, ja, hann var so... tí,... var tað so ikki tað, so var tað eitt ógvuliga.... var tað ikki eitt, sum fleyt, so var tað eitt ógvguliga væl eftirgjørt eh... eftir gjørd dukka – soleiðis tók hann til, ... tað ivaðist teir ikki í, nei...
P:Tú e... og hvat. tú verður avloystur nú klokkan 7 eisini?
H: eg verði avloystur klokkan 7, ja...P: ok.. veitst tú hvat, eg kunnu vakthavandi, sum nú møtir her, og so kunnar tú hjá tær, og so mugu tit bara snakkast við...
H: Ja,
P: ha?
H: Ja
P: bara gera upp á tann máta, so tey koordinera okkurt.
H: ja, tað er í lagi tú.
P: fínasta slag, o.k. bei...

Samlaða longd á upptøkuni er: 3 min 57 sek.